# milliardir í Sveis

varð skrásett á alternativa virðirbrævamarknaðinum í London, AIM, tók virksmið veruliga dik á seg.

Felagið tillutaði sær fleiri leitiloyvir í bretskum og føroyskum øki og hevur síðani økt munandi meiri um sítt virksemi við enn fleiri leitiloyvum í somu økjum umframt í norskum øki eisini.

## Head-huntaður til Sveis

*Nú ert tú so farin til Sveis at arbeiða hjá svenska felagnum Lundin. Hvussu kom hetta í lag?*

- Tað var ígjøgnum AUPEC, har eg hevði verið útleigaður til frammanundan. Lundin Petroleum setti seg í samband við AUPEC og spurdi, um tey kundu peika á onkran búskaparfrøðing, sum tey kundu brúka. Eg varð stillaður inn sum ein kandidatur, og tað endaði við, at eg fekk henda møguleikan.

*Hvussu kendist tað?*

- Tað var við blandaðum kenslum, at eg fór frá Føroya Kolvetni, sum mær dámdi sera væl at arbeiða hjá. Kortini valdi eg, í samráð við familjuna, at taka við hesi nýggju avbjóðingini, tí okkurt segði mær, at um eg skuldi fáa møguleika at royna onnur ting, so var tíðin búgvin til tað, sigur Teitur Poulsen og leggur afturat:

- Eg sigi sum sangskrivarin Kris Kristofferson: "eg vil heldur angra okkurt, eg havi gjørt enn angra okkurt, eg IKKI havi gjørt".

*Hvørjar uppgávur hevur tú so hjá Lundin?*

- Eg bleiv settur sum búskaparfrøðingur hjá felagnum. Og hetta snýr seg um alt frá at virðismeta ognir hjá felagnum, so at ognirnar standa mát við dagsins virðir, til at virðismeta íløgur í nýggjar ognir. Eisini sovorðið sum at rokna út, um tað er ráðiligt at fara undir at bora nýggjar brunnar.

Og hann heldur fram:

- Tað er umráðandi, at oljugoymslurnar hjá felagnum, sum verða virðismettir á hvørjum ári, standa seg tøkniliga og búskaparliga, so vissa er um, hvørt tað er grundarlag fyri at fara undir framleiðslu.

Men tingini standa ikki í stað, og Teitur hevur longu tikið við nýggjum avbjóðingum hjá Lundin Petroleum.

## Ein føroyingur afturat á veg

Sum tingini hava ment seg, so hevur Teitur fingið nýggjar uppgávur hjá Lundin Petroleum. Hann er fluttur í nýtt starv og hetta merkir, at 'gamla' starvið var tøkt hjá Lundin Petroleum, men er nú vorðið sett av einum øðrum føroyingi.

Um tað er tí, at leiðslan í Lundin hevur fingið góðar royndir av føroyingum, takkað verið avrikunum hjá Teiti, skulu vit ikki taka dagar ímillum, men í øllum førum hevur ein annar føroyingur, Tummas Pauli Mýri, fingið hetta starvið hjá Lundin í Sveis.

Tummast Pauli Mýri, sum hevur royndir frá oljuvinnuni í Føroyum, har hann millum annað hevur starvast hjá BP, fer til Sveis um hálvan mars at arbeiða saman við Teituri Poulsen og hinum starvsfólkunum hjá Lundin í Geneve.

At tveir føroyingar fara at arbeiða hjá einum altjóða oljufelagi, sum hevur eitt marknaðarvirði á meiri enn 20 milliardir krónur, má sigast at vera sera áhugavert.

Tummas Pauli Mýri starvast í løtuni í fíggjardeildini hjá Føroya Banka.

## Kunna leiðslu og íleggjarar

Har starvið hjá Teiti í Lundin higartil í stóran mun hevur snúð seg um at gera eftirmetingar av verandi ognum, umframt virðismetingar av nýggjum, so liggja nýggjar uppgávur á borðinum nú.

Teitur er nú vorðin sokallaður "Corporate Planner" hjá Lundin Petroleum.

- Leikluturin hjá mær er framvegis at taka støði í verandi og nýggjum ognum, men umframt hetta áliggur tað mær eisini at kunna leiðslu felagsins um hvat "reaserch analysts" skriva um Lundin Petroleum og at síggja til at fortreytirnar ið "research analysts" brúka til at rokna virðið á felagnum eru í tráð við tær almennu upplýsningarnar ið felagið hevur veitt marknaðinum. Funktiónin hjá "research analysts" er at ráðgeva møguligum íleggjarum, vanliga fíggjarligum institutiónum, hvørt tað er ein skilagóð íløga at keypa partabrøv í Lundin Petroleum. Í stuttum so skal eg halda eyga við, at tøl og metingar eru røtt, greiðir Teitur frá.

Orsakað av hesum nýggju uppgávunum hjá Teiti skuldi onkur setast í staðin fyri hann at røkja verandi uppgávur, og tað er í hesum sambandi at Tummas Pauli Mýri er komin inn í myndina.

Teitur vísti leiðsluni í Lundin á Tummas Paula sum ein kandidat til búskaparstarvið, og tað tók henni ikki langa tíð at koma ásamt við Tummas Paula um starvsetanina.

- Politikkurin hjá Lundin er, at tá eitt nýtt starv er leyst, so verða verandi starvsfólk spurd, um tey kenna onkran skikkaðan persón at seta. Eg kundi sostatt peika á Tummas Paula, men fyri tað var einki givið upp á forhond, og Tummas Pauli mátti sjálvur í samtalu sannføra tey um sín dugnaskap, greiðir Teitur Poulsen frá.

## Har sólin altíð sær

Sveis er annars kent fyri sína vøkru og stórslignu



Tummast Pauli Mýri, sum hevur royndir frá oljuvinnuni í Føroyum, har hann millum annað hevur starvast hjá BP, fer til Sveis um hálvan mars at arbeiða saman við Teituri Poulsen og hinum starvsfólkunum hjá Lundin í Geneve

náttúru, har umstøðurnar fyri at standa á skíð skara framúr alt ári á tamb. Vit spyrja tí loksnins Teit, um hann tekur skíðirnar fram viðhvørt:

- Jú, eg taki tær fram av og á. Tað er kanska í so nógv sagt, at eg havi lært meg at standa á skíð, men eg geri spakuliga framstig – oman kemur man so altið - sigur Teitur Poulsen at enda í samrøðu við Sosialin.




*Teitur framman fyri modelli av framleiðslu-, goymslu-, og ídnaðarskipinum Alvheim FPSO. Tað er í vinnu í einum øki í Noregi, sum Lundin Petroleum eigur 15 pst. í. Økið verður í løtuni útbygt og kemur eftir ætlan at framleiða í summar.*

# Føroyar kundu verið meiri lokkandi fyri oljufeløg

Hóast langt úr landi skotin so eygleiðir Teitur Poulsen eisini gongdina í føroysku oljuvinnuni. Hann heldur, at umráðandi er at fáa fatur á meiri vitan, um verulig gongd skal koma á føroyska oljuvinnu.

- Tað er framvegis sera lítil vitan fingin til vega um føroysku undirgrundina. Tað eru bert 5 brunnar boraðir enn, og um vit samanbera við til dømis Noregi, so eru fleiri enn 1000 leitibrunnar boraðir har meðan vestan fyri Hetland bretsku megin eru yvir 200 leitibrunnar boraðir, vísir hann á.

## Strong trygdarkrøv

Hann vísir eisini á, at hóast oljufeløg hava áhuga í at bora, so er hetta ikki so lætt kortini, tí torført er at fáa fatur á boripallum at bora í føroyskum øki.

- Trygdarkrøvini í Føroyum eru sera strong. Bretskir boripallar kunnu ikki pr. automatikk nýtast í Føroyum, tí føroysku trygdarkrøvini eru strangari enn í Bretlandi. Spurningurin er, um tað er neyðugt at hava so strong krøv í Føroyum, heldur Teitur Poulsen.

Hann heldur tað vera vert at umhugsa, at tá boripallar eru nóg tryggir at nýta í bretskum øki, um teir so ikki eru tað í føroyskum øki eisini.

- Kanska gera vit okkum eina bjarnatænastu við at seta so strong krøv. Seinast borað var í Føroyum, mátti boripallurin heintast heim líka úr Brasil, hóast at aðrir boripallar, ið ikki luku tey føroysku trygdarkrøvini, men sum reint tøkniliga kundu havt borað brunnin, lógu beint hinumegin markið í bretskum øki, vísir Teitur Poulsen á.

## Eisini skattaskipanin forðar

Ein onnur forðing fyri at fáa meiri gongd á føroyska oljuvinnu heldur Teitur vera skattaskipanina, ið ikki er nóg lokkandi. Marginalskatturin í Føroyum fyri oljuinntøkur er ov høgur samanborið við onnur jomfrúulig økir. Gamaní er skattaskipanin líka góð ella betri enn tann norska og tann bretska, men sum eitt jomfrúuligt øki í oljuhøpi eigur størri munur at vera á, heldur Teitur.

Hann heldur tað vera rætt at broyta tey viðurskifti, sum føroyingar kunnu broyta rætta vegin. Til ber ikki at broyta tey náttúrugivnu viðurskiftini, sum jarðfrøði og veðurlag, men til ber at broyta vinnulig og samfelagslig viðurskifti, so tað gerst meiri lokkandi fyri oljufeløg at koma hendanvegin.

- Onkur burdi spurt seg sjálvan, hví tað ikki er meiri ferð á leitivirkseminum í Føroyum enn tað sama við hesum høgu oljuprísunum, sigur Teitur Poulsen at enda.